Jú, sanniliga duga tvøráfólk sjálv

Bergur Bærendsen
Valevni á samgongulistanum, Lista A

Eg skal ikki dylja yvir, at ta› var› vi› stórum spenningi eg bí›a›i eftir, at valgreinarnar frá hinum 32 uppstilla›u til b‡rá›svali á Tvøroyri skuldu koma á prent. Og ta› er helst ein serligur spenningur, tá ein, sum eg, hevur siti sítt fyrsta skei› í b‡rá›sarbei›inum, og nú aftaná 4 ár kann vænta sær ymiskar hugsanir og meiningar um ta›, sum hevur veri› á skránni hesa tí›ina.

Eg hev›i ikki ætla mær út í naka› beinlei›is tjak vi› navngivnar persónar, uttan at eg so ella so ver›i bi›in um hetta. Tí ætli eg mær heldur ikki, í samband vi› hesa vi›merkingina, at draga nakran serstakan greinskrivara fram á pallin.

Eg kann bara sta›festa, at fyri nógvar av teimum greinum og vi›merkingum, í samband vi› b‡rá›svali› á Tvøroyri, eg hígartil havi lisi›, er gjøgnumgangandi hugsjónin:
At gongdin seinastu árini, fyri fólkatal eins og vinnulív, hevur havt eitt brá av avtoftan yvir sær
At tvøráfólk eru ”prísgivin til teir magtfullu mynduleikarnar nor›anfjør›s”
At vinnulívi› á Tvøroyri líti› og einki megnar
At tey tiltøk Tvøroyrar B‡rá› hesi seinastu 4 árini hevur framt, fólkinum á Tvøroyri at gagni, líti› og einki vir›i hava
At ætlanir b‡rá›sins í samband vi› umlegging av kommunuskuldini, fara at gera ilt verri

Ta› er harmiligt, at sundurlyndi› enn hevur fastatøkur millum summi av teimum, sum bjó›a seg fram til b‡rá›svali›. Eg gó›taki einki av omanfyristandandi svartskygni, men vil hinvegin sta›festa:
At fólkatali› á Tvøroyri aftur stendur í øking, og er nú væl omanfyri 1800 íbúgvar
at vinnulívi› á Tvøroyri styrknar ár um ár,

prógva vi› eini stórari øking í partafelagsskattinum
at ta› fyrst og fremst eru tvøráfólk sjálvi, sum eiga og skulu loysa egnar trupuleikar
at Tvøroyrar Kommuna saktans megnar at gjalda ni›ur skuldina, eftir tí leisti, sum er skorin í avtaluni vi› Landsbankan

Ta› hevur veri› eitt av a›almálunum hjá sitandi b‡rá›, at fáa goldi› skuldina so langt ni›ur sum gjørligt. Hetta hevur havt vi› sær, at skuldin er ni›urgoldin vi› umlei› 40 mió. kr. seinastu 5 árini, umframt at vit nú hava fingi› umlei› 22 mió. kr. eftirgivnar. Á henda hátt ver›ur skuldin álei› 108 mió. kr. um ársskifti› og ver›ur ætlandi 65 mió. kr. um 5 ár. Til tess at náa hesum máli krevst, at umlei› 15 mió. kr . ver›a goldnar í rentum og avdráttum um ári› komandi 5 árini. Hetta er ta› sama ella heldur minni enn gjaldi› seinastu árini. Her er ikki grundarlag fyri tí svartskygni, sum fleiri greinskrivarar leggja fyri dagin.

Lat ongan iva ver›a um, at eg trúgvi uppá eina stóra framtí› fyri Tvøroyri. Her er ta› fólk, i› skal til – solei›is sum ta› altí› hevur veri›. Og pláss er fyri øllum n‡ggjum kreftum, sum vilja virka fyri, at Tvøroyri styrkir sína stø›u enn meiri.

Megna b‡rá›spolitikkarar okkara framyvir at standa sum ein ma›ur, í arbei›inum at bera b‡in fram, ja so ver›a ta› tvøráfólk sjálvi, sum framyvir seta dagsskránna fyri Tvøroyri.

VI‹MERKINGAR

Kvinnur í Havn

Johan Mortensen
Valevni fyri Tjó›veldisflokkin

Rættast var um kvinnur høvdu sín egna lista bæ›i til løgtings og kommunuval, hesin kemur kanska.

Yvirhøvur eru kvinnur alt ov illa umbo›a›ar bæ›i í politikki og vinnulívi›. Almenni peningastovnurin Føroya Banki hevur td., onga kvinnu í nevndini. Tú sær næstan ikki ein kvinnuligan stjóra hvørki hjá privatum ella almenum feløgunum. Okkum tørvar kvinnur í nógv fleiri lei›andi størvum.

Javnstø›islógin ver›ur alt ov líti› vird og var ta› ikki fyri eldsálum sum Turi› D Hentze var henda lógin skjótt gloymd í manschauvinistiska føroyum anno 2000.

Tjó›veldisflokkurin í komandi B‡rá›i› vil endursko›a allar nevndir solei›is at rætt kynsb‡ti› ver›ur allasta›ni har B‡rá›i› ræ›ur fyri borgum og seta kvinnur í lei›andi størv í kommununi.

Tjó›veldisflokkurin vil stu›la kvinnuáhugamálunum í Høvu›ssta›num.

Rættar kvinnur velja Tjó›veldi› og framtí›ina.

Kommunuvali› í Gøtu

Gu›run M. Hansen
Valevni á javna›arlistanum í Gøtu

Í árinum 1974 var ein n‡ggjur skúli tikin í brúk í Gøtu. Tá var hetta ein sera gó›, bílig og vælumhugsa› loysn. Eitt satt megnarverk. Hetta var ein skúli, i› hev›i nógv at bjó›a børnum, ungum og eldri eftir tátí›armeti.

Sum ung og sera ítróttaráhuga› var eg sera gla› fyri hesa loysn. Nú kundu vit øll: børn, ung og eldri hava gle›i av at n‡ta skúlan á ein hátt, i› hóska›i til tí›ina. Okkara skúli taldist ímillum teir fremstu skúlarnar, hølum vi›víkti.

Serliga var eg fegin um fimleikarhøllina og svimjihylin, og var eg ein av teimum, i› n‡tti gott av at hava bæ›i fimleik og svimjing í kvøldskúlahøpi og á annan hátt.

Hetta var ein n‡ggjur og gó›ur møgulleiki hjá fólki, i› hev›i henda áhuga, og ta› vóru nógv.

Í dag seta vit øll størri krøv. Í dag er meira aktivitetur í frítí›ini, enn ta› var tá og tí›irnar eru broyttar sera nógv hesi árini.

Mín metan er, at tí›in er farin frá hesum at hava kombinera›a fimleikarhøll / svimjihyl.

Nú eru tí›irnar betri, so mín hugsan er, at vit eiga at gera ein skúla til børn, ung og eldri, har tú kanst hava fleiri ítróttargreinar alt ári›. Her ver›ur hugsa› um: Badmiton, fimleik, flogbólt, bor›tennis, svimjing, fólkadans og hvat annars kann vera, tá i› tú hevur eina fimleikarhøll og svimjihyl hvør sær.

Hetta siggi eg sum ein fyrimun bæ›i fyri skúlan og fyri frítí›araktivitetir í bygdini. Tí›in er komin til, at vit gera hetta betri. Vit eiga ikki at sovna, og lata onnur yvirhála› okkum á hesum øki.

Gott hev›i veri›, um vit kundu bjó›a fólki ta› solei›is, at tey kundu gjørt allar ítróttargreinar alt ári›. Ikki kapping ímillum ítróttargreinarnar, men har børn, ung og eldri frítt kunnu velja hvat tey hava hug til.

Vit hava eitt blómandi vinnulív og nógv arbei›spláss, sum jú eru ein lívstreyt, men kanningar uttanlands vísa, at skal ein kommuna vaksa, og fólk trívast, so er ney›ugt at lokalsamfelagi› t.v.s. kommunan hevur nøkur tilbo› at bjó›a borgaranum. Ta› vil siga barnaansing, sum vit jú hava, men frítí›arvirksemi› fyri børn, ung, og vaksin kundi veri› nógv betri, fingu vit eina fimleikarhøll burturav til fimleik, badmiton, flogbólt, bor›tennis, fólkadans o.a.

Hetta er mítt hjartamál, nú eg stilli upp til kommunuval.

Vit eiga eisini at arbei›a fyri at byggja eitt eldrasamb‡li›, so sum Fuglafjør›ur, Skála og Ei›i hava gjørt. Hetta skilda vit okkara gomlu, og hetta er eisini eitt av mínum hjartamálum.Annars gott val.

Sosialpolitikkur

He›in Mortensen
b‡rá›slimur, valevni til Tórshavnar b‡rá› á lista B heimasí›a: www.hemorten.com

Okkara sosialpolitikkur eigur rættiliga sjálvsagt at ver›a grunda›ur á tørvin hjá tí einstaka. Og tá tørvurin er ymiskur, so er ta› fyri mær líkaso sjálvsagt, at okkara sosialpolitikkur skal lagast eftir føroyskum vi›urskiftum. Kommunan skal yvirtaka allan sosialpolitikkin og virka fyri at fremja ábyrgd í sosialum veitingum og fullkomiliga for›a fyri, at sosialpolitikkur kann n‡tast sum politiskt útgjaringarambo›.

Vit skulu líka so sjálvsagt virka fyri, at ellisheim, ellisíbú›ir og vardar íbú›ir ver›a bygdar, og vit skulu krevja av landsmynduleikunum, at røktarheimstørvurin í Tórshavnar Kommunu ver›ur nøkta›ur. Kommunan skal útvega sær betri innlit í sosialmál.

Men hetta eru bara yvirskriftirnar. Fyri at kommunan skal fungera sosialt, so er ikki nóg miki› vi› yvirskriftum um yviror›na›an sosialpolitikk. Vit skulu eisini stu›la teimum, i› stu›la. Vit skulu hjúkla um hjálparfelagsskapirnar, i› eru næstir veruligu trupulleikunum. Vit skulu veita hjálp til sjálvhjálp. Bert á tann hátt kunnu vit laga ein sosialpolitikk til veruliga tørvin, og nøkta tørvin í øllum li›um.

VI‹MERKINGAR

Ni›ur á 19

Torleif Sigur›sson

Roknast kann vi›, at Klaksvíkar Kommuna í ár kemur at hava eina skattainntøku upp á umlei› 92 milliónir krónur, og hetta vi› einum skattaprosenti upp á s0.

Um gongdin ver›ur nøkulunda tann sama sum tvey tey seinastu árini, kann roknast vi›, at skattainntøkan hjá kommununi, vi› sama skattaprosenti sum nú, innan tvey ár, er farin upp um 100 milliónir krónur.

Vi› hesum í huga eigur at setast sum mál, at skattaprosenti› í komandi valsetu ver›ur sett ni›ur vi› 1/2 prosenti, frá 20 ni›ur á 19, og kann hetta gerast vi› at lækka skattin vi› 1/2 prosenti í 2002, 1/4 prosenti í 2003 og vi› 1/4 prosenti í 2004.

Ta› kann kanska tykjast í mótsøgn vi› tann íløgutørv, sum kommunan metist hava, at ko ma vi› einum slíkum uppskoti, sum hesum, men spurningurin er, um ta› ikki er rætt at hava hetta sum a›almál, solei›is at borgarin eisini fær okkurt burturúr sjálvur og kann merkja, at komi› er úr nívandi kreppuni í nítiárunum.

Ney›ugt er eisini at gera sær greitt, at skattaprosenti› aftur má koma ni›ur á eitt meira rímuligt stø›i.

Vi› hesum ver›ur eisini sett valda b‡rá›num størri krøv til, at skattapeningur borgarans ver›ur brúktur á skinsamasta hátt, og at ta› altí› skal fáast sum mest fyri innkravdu skattakrónurnar.

Nógv heldur ein b‡rá›slim !

Absalon Matras
valevni Sambandsfloksins

Eg síggi, at fleiri valevnir skjóta upp, at Nor›oyri fær eina sta›bundna nevnd eins og Árnafjør›ur.

Eg eri eitt sindur ivasamur, um ta› er rætt vi› fleiri sta›bundnum nevndum í einum so konsentrera›um øki sum Klaksvíkar kommunu. Fyri mær sær ta› út sum, at b‡rá›i› roynir at sleppa sær undan ábyrgd vi› at lata part av kommununi velja sta›bundna nevnd. Men eg vóni tó, at árnfir›ingar fáa nyttu av nevndini i› nú skal veljast.

Ta› er skylda hjá b‡rá›slimum okkara at fylgja vi› hvat hendir í útja›aranum í kommununi. Tey sum búgva í Árnafir›i og á Nor›oyri hava sama rætt til gó›ar vegir, spælipláss o.a. sum restin av kommununi. Ta› er ábyrgdin hjá b‡rá›num at tryggja at so ver›ur.

Eg veit, at fólk á Nor›oyri gera b‡rá›i› vart vi› vi›urskifti sum ikki eru nøktandi. Eg yvist ikki í, at árnfir›ingar gera ta› sama. Men ta› vísir seg ofta at vera trupult at fáa naka› gjørt.

Ein sta›bundin nevnd hevur ikki avger›arrætt. Tí er ta› avmarka›, hvat ein slík nevnd kann fáa av skafti.

Sum búgvandi á Nor›oyri og sum valevni til b‡rá›i› fari eg hervi› at heita á tykkum - veljararnar á Nor›oyri - um at ”satsa” uppá tykkara valevni. Ein b‡rá›slimurin hevur nógv størri ávirkan enn ein sta›bundin nevnd.

B‡rá›slimir eiga at arbei›a fyri trivna›i hjá øllum borgarum í kommununi.

Gott val!

Barnaansingin

Høgni Mikkelsen
Valevni Sambandsflokkin til Tórshavnar B‡rá›

Nú er nokk tosa›, nú skal arbei›ast

Fyri 4 árum sí›ani var› nógv skriva› um hvussu tørvurin á barnaansing skuldi loysast her í Havnini. Foreldrafelagi› skipa›i fyri fundi uppi í Nor›urlandahúsinum um sama mál, tí ta› mangla›u umlei› 300 vøggustovu- og barnagar›spláss.

Tá lova›u valevnini, at nú skuldi ein loysn finnast. Ta› eru 4 ár sí›ani og eingin loysn er funnin enn tørvin vi›víkjandi barnaansing.

Nú b‡rá›sval er fyri framman, hava valevnini aftur eina loysn, men einki hendir. Fyri mær sær ta› út sum at eingin loysn skal finnast, tí hvat skulu valevnini, i› ver›a vald, skriva og lova tá val ver›ur aftur um 4 ár?

Her er loysnin

Á b‡rá›num liggur ein verkætlan, sum eg og ein gó›ur vinma›ur hava arbeitt vi› í eina tí›. Grundin til at vit fóru í gongd vi› hesa verkætlan var, at ta› blívur einans tosa› og tosa›, og so ver›a onkrar lappaloysnir hist og her, og ta› gongur ikki í longdini.

Ta› skal gerast ein varandi og skilagó› loysn, og ta› er at byggja fleiri barnagar›ar, sum barnafamiljur áttu at havt krav uppá eftir mínari hugsan.

Til tykkum foreldur og tykkum, i› ætla sær at fáa børn, seti› krossin á rætta sta›, tá tit fara á val tann 21. november, tí annars fara tit aftur á foreldrafund uppi í Nor›urlandahúsinum um 4 ár.

Hetta er eitt málsøki, sum eg hev›i arbeitt nógv vi›, um eg bleiv valdur.

Høvu›ssta›urin má fáa betri sømdir

Leivur Hansen,
borgarstjóri

Her stutt undan b‡rá›svalinum kunnu borgarnir í landsins størstu kommunu av røttum fegnast um, at kommunan bæ›i er vor›in størri, sterkari og ríkari enn fyri f‡ra árum sí›ani.

Størri bæ›i í vídd og fólkatali. Sterkari vi› ta› at fólkatali› er munandi økt - og ríkari, tí ta› er ein sannroynd, at kommunan er komin alsamt betur fyri fíggjarliga.

Hóast alt sostatt sær út til at ganga upp á stás, so skerst ikki burtur, at medaljan eisini hevur sína minni bjørtu baksí›u.

Havnin veksur nevniliga so skjótt, at ta› er vor›i› torført hjá myndugleikunum at fylgja stevinum - ikki minst vi› teimum bindingum, landsmyndugleikarnir leggja á kommunurnar.

Her ver›ur fyrst og fremst hugsa› um íløgulofti›, i› álagt er kommununum.

At vit hava fingi› Argir og fáa Kollafjør› vi› í kommununa, er sjálvandi óført fyri kommunukassan og fíggjarstø›una hjá kommununi.

Men íløgulofti› for›ar fyri, at tænastustø›i› kann hækka samsvarandi.

Seinastu árini hevur fólkavøkstur í høvu›ssta›num ligi› um 300 fólk um ári› í me›al. Bara í hesum valskei›num er fólkatali› vaksi› vi› sama íbúgvaratali sum í Vestmanna - stívliga 1200 fólkum!

Men sambært feskastu metingunum hjá hagfrø›ingum kunnu vit vænta en upp aftur størri fólkavøkstur næstu árini - ella eini fimm prosent um ári›. T.e. tvífalt so nógv sum nú.

Ver›ur hetta so, ja, so duga ivaleyst øll at ímynda sær, hvat úrsliti› ver›ur, fær kommunan ikki umstø›ur og møguleikar at brynja seg til hesa innrás.

Ta› er tí alney›ugt, at landsmyndugleikarnir vísa størri fatan fyri hesum serligu vi›urskiftum - ikki bert her í høvu›ssta›arøkinum, men eisini í ø›rum vakstrarøkjum í landinum - og hækka íløgukvotuna tilsvarandi.

Í ár hevur Tórshavnar kommuna - saman vi› Kollafjar›ar kommunu - møguleika at gera n‡íløgur fyri 63 miljónir krónur. Næsta ár ver›ur kvotan 69 miljónir.

Til samanberingar kann nevnast, at bara ta› eina ári› í áttati-árunum vóru íløgur gjørdar her fyri umlei› 130 miljónir krónur.

Hetta var í høvu›sheitum fyri læntar pengar, me›an kommunan í dag fíggjar alt sítt virksemi sjálv gjøgnum skattainntøkuna. Og ta› ætla vit at halda fram vi› - uttan at økja um lánibyr›u ella skattatr‡st.

At hetta ber til, er ikki minst teirri stóru skuldarni›urgjaldingini seinastu árini fyri at takka.

Eitt íløguloft uppá 70-75 miljónir krónur um ári› hev›i møguliga veri› á eini lei›, høvdu ikki fleiri íløgur ligi› á láni, orsaka› av kreppuárunum, tá at kalla ongar n‡íløgur vóru gjørdar.

Men skal kommunan bara nøkulunda kunna nøkta tey mest ey›s‡ndu krøv og tørv, hon hevur at dragast vi› í løtuni, má og skal hon fáa ví›ari ræsur at virka undir.

Tjó›veldisflokkurin fer ikki at helma í, fyrrenn hesi vi›urskifti eru komin í rættlag.

Tjó›veldisflokkurin hevur fyri fyrstu fer› havt lei›sluna í Tórshavnar b‡rá› eitt heilt valskei›. Flokkurin hevur sta›i› á odda fyri tí mi›vísa og uppbyggjandi politikki, i› førdur hevur veri› hetta valskei›i›.

Tjó›veldisflokkurin er sjálvandi fúsur at átaka sær lei›sluna aftur næstu f‡ra árini og fer til val vi› gó›um vónum og gó›um treysti.

Gott val!